# Bilar til sølu

**SsangYong Rexton RX290 4WD *"7 setur"***



*prísur* **290.000,-**

· Árgang 2003 · km 22.500 · Aut. gear · 2,9 Turbo diesel intercooler · Automatiska í- og úrkoblan av 4WD · Centrallás · Fjarstýrdan lykil · Tónaðar rútar · Krók · Lættmetalfelgur við dekkum · Pioneer anlegg við fløguspælara · Vælhildin

**Citroen Jumpy 2,0 TD Vørubilur**



*prísur við mvg* **120.000,-**

· Árgang mai 1998 · Km 80.000 · Radio, el-rútar, nýlakkeraður, í sera góðum standi.

**BILVERKSTAÐIÐ**

v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 51 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Sosialurin 341800

# Bilførari til trailara

Søkt verður eftir royndum bilførara til trailara at byrja skjótast gjørligt.

Áhugað biðjast ringja á tlf. 221766 ella 221742

**R. T. S. Contractors**
**627 Lamba**

RSF 1980

# Aðalfundur RSF

Aðalfundur Róðrarsambandsins, sum lýstur varð at verða leygardagin 27. mars kl. 10:00, er fyribils útsettur. Lýst verður seinni, nær fundurin verður.

**RSF**

# Starv sum umsitingarleiðari

Nú umsitingarleiðarin á Føroya Sjómansskúla fer í annað starv, verður søkt eftir nýggjum umsitingarleiðara frá 1. mai 2004.

**Vit kunna bjóða:**
- Eitt spennandi starv í einum sera góðum umhvørvi, bæði tá tað snýr seg um karmar og samstarv ímillum leiðslu, umsiting, lærarar og næmingar.

**Starvs- og ábyrgdarøkir:**
- Bókhald og fíggjarstýring.
- Skráseting og journalisering
- Viðlíkahald av teldukervi. Administrator.
- Umframt vanligt skrivstovarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving við hóskandi eftirútbúgvingum.
- Hægri Handilsskúla ella líknandi og/ella hollar starvsroyndir.
- Teld á høgum førleikastigi. Kunnleika til dátubásubygnað.
- Kunna vera netfyrisitari.
- Hava góðar samstarvseginleikar.

**Setanarviðurskifti:**
- Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Sjómansskúla,**
Nóatún 2,
Postboks 104,
FO-110 Tórshavn,

í seinasta lagi mikudagin 14. apríl 2004.

LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Starvslesandi í London og Brússel

**(Stagiaire)**

Søkt verður eftir lesandi til ávikavist sendistovu Føroya í Bretlandi (London) og sendistovu Føroya í Evropasamveldinum (Brússel). Starvstíðin er frá september 2004 til februar 2005 ella fyri lestrarhálvárið.

Meiri fæst at vita um uppgávur, førleikakrøv, starvsstaðið, setanartreytir og umsóknarfreist, við at fara inn á heimasíðuna www.tinganes.fo .

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Læknaskrivari

Á Medisinska deplinum er fulltíðarstarv sum læknaskrivari leyst at søkja fyri læknaskrivara í farloyvi til setan 1. mai 2004 ella eftir avtalu til og við 31. januar 2005.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 6103 ella á e-post saunn@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 13. apríl 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um starv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

## Heimarøktin í Norðoyggjum

# Summarfrítíðar-avloysarar

Søkt verður eftir avloysarum fyri sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar frá 15. juni til 31. august 2004. Søkt verður eftir fólki sum vilja arbeiða í skiftandi vaktum.

Heimarøktin fevnir um alla heimahjálp og heimasjúkrarøkt í Norðoyggjum, umframt 2 Eldrasambýlir. Arbeitt verður frá kl. 8.00 til 23.00 úti og alt døgnið í Sambýlunum.

Vegna burðarfarloyvi hjá sjúkrarøktarfrøðingi verður møguleiki fyri setan til januar 2005.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn saman við aritið av prógvum, autorisation og upplýsingum um arbeiðsroyndir verður at senda til økisleiðaran í **Heimarøktini í Norðoyggjum, Bøgøta 34, 700 Klaksvík, tlf. 457243.**

Umsóknarfreistin er 14. apríl.

Sosialurin



# Bilur til sølu

Mitsubishi Pajero jeepur frá 5/1995, 4-hjólstrekk, til sølu fyri 70.000 kr.

**SEV**
Att.: Jørleif Vang
Tlf. 346820
Tórshavn

# zarepta

Um Gud við, verður bíbliugransking í Zarepta á Páskum.

**Tíð:**
Skeiðið byrjar mikukvøldið 7. apríl 2004

Aldursmark 17 ár og eldri

**Tilmelding:**
Áhugað verða biðin um at tekna seg í góðari tíð á tel 31 50 62 ella 22 96 80

**Verið vælkomin til zarepta**

# Reyði Krossur Føroya

Aðalfundurin er sunnudagin 28. mars 2004 kl. 15.00 í húsum felagsins.

Limagjaldið er: Húski kr. 150,-
Feløg v.m. kr. 400,-

Giro 53252 ella konto í peningastovnunum

Tórshavn 22.03.04.
**Súni Vinther, form.**

# Aðalfundur

## hjá Fosturforeldrafelagnum

Fosturforeldrafelagið hevur aðalfund á Tórshavnar Sjómansheimi leygardagin 3. apríl 2004 kl. 9.30. Skrá sambært lóg felagsins.

Eyðun Joensen heldur fyrilestur um evnið: Fosturumsorgan/vansar.

**Nevndin**

Havnar SJÚKRAKASSI

# Umboðsráðsval

**verður hósdagin 25. mars 2004.**

Hesi valevnir eru uppstillaði til umboðsráðið hósdagin 25. mars 2004.

Solveig S. G. Isfeldt, J. C. Svabosgøtra 17, Tórshavn *)
Kirstin M. Jacobsen, Sundsvegur 25, Tórshavn
Mary Johannesen, Kristiansgøta 11, Hoyvík *)
Guttorm Mortensen, Lýðarsvegur 15, Hoyvík *)
Katrin Petersen, Hoydalsvegur 30, Tórshavn

Teir persónar sum eru merktir við " *) " eru umboðsráðslimir, sum hava sitið farna skeiðið.

Valt verður frá kl. 9.00 til kl. 18.00

**Havnar Sjúkrakassi**

# Íbúð til leigu

Ljós og góð kjallaraíbúð Millum Gilja 61, á umleið 60 m² til leigu frá 1. apríl

**Tlf. 228999/257155**

# FLOKSTING 2004

Árliga floksting Tjóðveldisfloksins verður í ár í Norðoyggjum, á Tekniska Skúla í Klaksvík.
Undir høvuðsyvirskriftini

## VIRÐISØKING • í vinnuni • millum fólk • millum tjóðir

verður skráin fyri flokstingið henda

**Fríggjadagur 26. mars**

| | |
|---|---|
| 19.00 | Aðalstjórnarformaðurin setur tingið<br>Tingið skipar seg við formanni og tingskrivara |
| 19.30 | Grannskoðaður roknskapur verður lagdur fram |
| 20.00 | Umrøða av innkomnum uppskotum og atkvøðugreiðsla |
| 21.00 | Frágreiðing frá møguligum sernevndum og Unga Tjóðveldi |
| 21.30 | Val av starvsnevnd:<br>Val av aðalstjórnarformanni(§10, stk. 2)<br>Val av starvsnevndarlimi (§10, stk. 3)<br>Val av starvsnevndarlimi (§10, stk. 7) |
| 22.00 | Val av grannskoðarum og tiltakslimum |
| 22.30 | Fundurin niðurlagdur |

**Leygardagur 27. mars**

| | |
|---|---|
| 09.00 | Kaffi |
| 09.30 | Gestarøðarar fyri samstarvsflokkar Tjóðveldisfloksins<br>- Steingrímur J. Sigfússon<br>- Umboð fyri IA |
| 10.00 | Frásøga floksformansins frá farna skeiði |
| 10.30 | Orðaskifti um frásøgu formansins |
| 12.00 | Matarsteðgur |
| 13.00 | Orðaskifti um frásøgu formansins heldur fram |
| 14.00 | Gestarøðari: Egil Olsen røður um virðisøking<br>Orðaskifti |
| 15.00 | Kaffisteðgur |
| 15.30 | Gestarøðari: Malena Arnoldsdóttir, forkvinna í Javna. Orðaskifti |
| 16.30 | Orðaskifti |
| 18.00 | Flokstingið endar við tjóðsanginum |

www.tjodveldi.fo

Leygarkvøldið skipar Norðoya Tjóðveldisfelag fyri Tjóðveldisveitslu á Tekniska Skúla.
Tekning til veitsluna fer fram hjá Hergerð, tel 21 64 71, ella hjá Pól Fuglø, tel 22 56 77

**Møtið fjølment!**

# TJÓÐVELDISFLOKKURIN